**ARBEIÐSLÍV.** Tryggleikanarkomanar, sum ikki stremba eftir at koma sær fram á arbeiðsplássinum. Soleiðis lýsa kassadamur í føroysku peningustovnunum seg sjálvar. Sosialurin hevur verið og skattað dýpið hinumegin kassarnar hjá Føroya Sparikassa í Saltangará, har konurnar í avgreiðsluni siga frá einum gerðandisdegi, fullum av reiðum peningi

# Konurnar við kassan

*Dánjal Højgaard*
*Høgni Mohr*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

- Eg haldi, at vit eru tryggleikanarkomanar.

Við kassa 2 skrivar 34 ára gamla Eilen Olsen eitt kekkhefti út til eina eldri konu. Framvegis er onkur, sum vil hava kekkar, hóast tað ikki longur er bíligasta loysnin.

Eileen var átta ár í Sjóvinnubankanum áðrenn hon fór í Føroya Sparikassa at arbeiða. Hetta var fyri fimm árum síðani. Tað var í stóran mun tryggleikin, sum taldi tá ið hon valdi sítt lívsyrki.

-Tað er eingin spenningur sum so. Tú veitst nøkulunda hvussu dagurin lagar seg. Tað er so at siga tað sama tú gerst alla tíðina, sigur Eilen, sum ikki er hon, ið droymir um at stovna sítt egna virki ella at sigla einsamøll kring jørðina við seglskipi.

-Tað veldst jú nógv um persónleikan. Tú ert á sama staði alla tíðina. Tú ert saman við teimum somu fólkunum. Og tú fært fasta løn. Tær nýtist ikki at vera so øgiliga framlig, sigur Eileen, og leggur dent á, at hon svarar bara fyri seg sjálva.

**Gulimaður**

Við kassa 3 situr Kinna Fritsdóttir Olsen og avgreiðir eina vinkonu úr bindiklubbanum. Har er vinkonuprát av tí rætta slagnum:

- Oyssuss, hey! Sig mær hvar *vart* tú í gjárkvøldið, sigur Kinna við vinkonuna, sum er komin at taka 300 krónur út.

At bankafólk skulu vera serliga keðilig, heldur Kinna Fritsdóttir Olsen vera eina mýtu. Trýogfjøruti ára gamla kassadaman á deildini hjá Føroya Sparikassa í Saltangará hevur svarið klárt.

- Vit eru ikki keðiligari enn lærarar...

Sumt arbeiði í einum peningastovni kann kortini vera eitt sindur keðiligt, viðgongur hon; serliga tað framman fyri telduskíggan. Og eitt serligt fyribrigdi er á sparikassadeildini í Saltangará, sum er bæði keðiligt og stuttligt: Gulimaður. Soleiðis nevna tey seinasta telduknappin, trýst verður á, tá ið kassin verður gjørdur upp, og farið verður til hús. Tann, sum situr eftir við Gulamanni, verður av somu orsøk síðsti maður, sum skal sløkkja og steingja. Tí Gulimaður skal arbeiða eina løtu, áðrenn telduskipanin er dagførd.

Ein góður kundi er sambært Kinnu ein persónur, sum er lættur at avgreiða, og sum tú kanst práta við, meðan trýst verður á knøttar og seðlar verða taldir. Og prátað kann vera um so mangt.

- Vanligt er, at prátað verður um okkurt lokalt. Ella arbeiðssteðgin í skúlunum, nú tað er so stórt mál, sigur Kinna. Hon er fullveldiskona, og við tey, sum hon kennir rættiliga væl, ber eisini til at lata okkurt orð falla um politikk. Men aðalmálið er altíð at hava góð viðurskifti við kundan. Bert í einum føri fara ósáldaðar meiningar um diskin: Tá ið talan er um ítrótt; serliga hond- og fótbólt.

**Eingin maskina**

Við kassa 2 biðir ein yngri kvinna um at fáa 237 krónur út frá Eilen. Tað er ikki nógv. Tey flestu biða um 500,1.000 ella 1.500 krónur. Annars hava plastikkkortini gjørt sína innrás í peningaverðini, og tað merkir, at arbeiðið við kassan er minkað.

Eilen tykist at hóska sera væl til ímyndina av konuni við kassan. Hon er blíð og fryntlig - og leypir ikki framav.

Men farið ikki skeiv.

Sparikassafólk eru menniskju úr kjøti og blóði, sum kunnu øsast og særast. T.d. um ein kundi verður persónligur, tí at konan við kassan sýtir honum pengar. Tá kann tað vera ein stór avbjóðing, at varðveita ta professionellu fasaduna, viðgongur Eilen.

-Tað, sum kann gera meg óða, er, um fólk ganga mær ov nær. Um tey siga okkurt sum er órímiligt ella eru smálig. Um tey leypa á sparikassan er kanska lættari at takla, sigur Eilen, sum kortini hevur dugað væl at stýrt sær.

-Eg havi so ongantíð staðið og rópt. Men eg havi nokk skeldað onkuntíð aftaná, smílist Eilen, sum heldur, at eitt tað keðiligasta, sum kann henda er, at trúnaðurin millum kassakonuna og kundan støkkur.

-Tað er óbehagiligt um onkur fer upp at rópa. Tað er ógvuliga keðiligt, at verða noydd, at siga okkurt við fólk, sum onnur kanska hoyra, sigur Eileen og leggur dent á, at yvirhøvur er tað als eingin trupulleiki at vera blíð og fitt við kundarnar. Tí tey allar flestu, sum koma til kassan eru vanlig hampafólk.

**Týdningarmikil null**

Beint áðrenn døgverða koma tvær konur til kassa 3 við sparibússuni. Teljingarmaskinan staðfestir, at 1.608 krónur eru í bússuni. Konurnar fáa pengarnar útgoldnar í seðlum og skunda sær á dyr.

Øll gera mistøk. Eisini tey í peningaheiminum, sum sita við kassan og telja seðlar. Nakrar ferðir er komið fyri, at Kinna hevur talt galið, men tá hevur kundin gjørt vart við mistakið, áðrenn hann er farin á dyr. Bæði tá ið hann hevur fingið ov fáar seðlar og tá ið ov mangir eru falnir honum í lut. Og nullini hava stóran týdning. Eitt vantandi null í endanum á upphæddini, broytir jú alt fullkomuliga. Einaferð gloymdi Kinna tvey null. Hon skrivaði 1.000, tá ið upphæddin átti at vera 100.000 krónur. Men tað varð rættað, og soleiðis er arbeiðið skipað; at tað skal bera til at gera mistøk. Hóast Kinna nevnir hesi mistøk, ger hon púra greitt, at tað er so sjáldan, og at nógvar túsund flytingar og skrásetingar eru í millum hvørt mistakið.

**Menn á ovastu rók**

Mennirnir ráða í peningaverðini. Bert tveir menn arbeiða á deildini hjá Føroya Sparikassa í Saltangará. Annar situr við evstu ábyrgd á deildini. Kinna, sum eigur trý børn, heldur tað ikki vera so løgið, at mennirnir sita í flestu ábyrgdarstørvum:

- Vit kvinnur hava kanska lyndi til at velja øðrvísi í tilveruni. Eg havi valt familjuna og børnini fram um arbeiðið, og tískil havi eg ikki havt hug at gerast leiðari, sigur hon.

Eilen Olsen hevur ongar ætlanir um at sleppa upp á ovastu rók í sparikassanum, hóast hon hvørki er bundin av manni ella børnum.





**- Vit eru ikki keðiligari enn lærarar, sigur Kinna Fritsdóttir Olsen, sum her setur teljimaskinuna í gongd**

# HYGG & HOYR

**Skírisdagur 20. apríl**

## Meiri ítróttur í SVF!

*– Hetta komandi árið verður nógvur ítróttur at síggja á SVF. Soleiðis sigur Øssur Winthereig, sum hevur ítróttin undir hond í Sjónvarpi Føroya. Vit í Hygg & Hoyr hava hugt at sindur at, hvat SVF í framtíðini hevur at bjóða ítróttaráhugaðum*

Heini í Skorini

Seinastu tíðina hevur nógv verið tosað um ítróttin í SVF, og serliga hevur nógv prát verið um tann enska fótbóltin, sum vit jú høvdu møguleika til fyrr at síggja á SVF, men sum vit jú ikki síggja longur.

Men samstundis sum enski fótbólturin nú endar, byrja fleiri aðrar sera áhugaverdar ítróttarkappingar, serliga her á landi. Fyrst og fremst er tað føroyski 1. deildar fótbólturin, sum nú fer á glið, og so er tað sjálvandi eisini kappróðurin. Í útheiminum verður í summar europameistaraheitið í fótbólti, og olympiadan verður eisini eitt sindur seinni. Spurningurin er so, hvussu sjónvarp okkara, SVF, fer at dekka hesar stóru ítróttarhendingar.

Vit hava fingið okkum eitt lítið prát við Øssur Winthereig, sum hevur ítróttin í SVF undir hond.

– Viðvíkjandi kappróðrinum hava vit avtalu við øll róðrarfeløgini. Tey taka allar róðrarnar upp á sjónband, og so nýta vit tað, sum tey filma. Vit ætla at vera við á øllum stevnunum, men tað verður við hjálp frá róðrarfeløgunum, sigur Øssur Winthereig um kappróðurin.

Annars byrjar jú sum sagt 1. deild í fótbólti jú eisini nú, og vit tosaðu eisini við hann um hetta. Fyrr minnast fleiri, at SVF plagdi at hava sera góðar og intensar ítróttarsendingar í endaspurtinum av 1. deild í fótbólti. Tað plagdi at vera síðstu fimm umførini, men hetta hevur ikki verið so nógv at sæð til seinastu árini. Í fjør sóu vit samandrátt av dystunum í tveimum teimum síðstu umførunum.

– Vit hava ikki ætlanir um at fylgja við og taka fótbóltin upp hvønn einasta sunnudag, men her hava vit roynt at fingið eitt samarbeiði í lag, tí á sama hátt sum í kappróðrinum taka fleiri lið dystir sínar upp á sjónband, og so kundu vit brúkt tað. So hava vit onkuntíð gjørt tað fyrr, at tá kappingin líður móti endanum, hava vit dekkað tað meiri intenst, um ein kann siga tað soleiðis. Men Øssur leggur eisini afturat, at ein skal ikki vænta, at teir klára at vera á øllum støðum, sum teir gjørdu fyrr.



Spurdur, um teir so hava nakrar ætlanir um at økja um senditíðina av ítrótti, sigur Øssur, at tað verður heilt víst nógvur ítróttur ar síggja komandi árið, í sambandi við at tvær sera stórar ítróttarhendingar standa fyri durum. Tann fyrsta er europameistaraheitið í fótbólti, sum verður í Hollandi og Belgia í summar, og so byrjar olympiadan jú í august mánaði.

– Hesar báðar kappingarnar ætla vit avgjørt at senda, men tað verður í samstarvi við norskt og danskt sjónvarp. So vit fara at økja sera nógv um ítróttin, men tað er ikki júst tann føroyski ítrótturin, vit mest koma at senda.

Øssur sigur eisini, at hóast føroyski ítrótturin verður á leið tað sama, sum hann hevur verið, so ætla teir, sum teir eisini altíð hava gjørt, at fylgja við, tá føroyameistaraheitið í svimjing verður, og tann kappingin byrjar Dýra Biðidag. Tá vit so koma inn á sendingar sum Mál Mál Mál, sigur Øssur, at enska Premier League og Mál Mál Mál keyptu teir alt í einum pakka, og tann pakkan keypa teir sum nevnt ikki longur, so tað síggja vit ikki fyribils.

– Men tað, sum vit í sjónvarpinum umhugsa og arbeiða við í løtuni, er at byrja so smátt at víst eitt sindur av útlendskum ítrótti í Degi og Viku, og so sum frá líður, at føroyski ítrótturin eisini verður ein partur av Degi og Viku so sum upptaktir og úrslit. So er spurningurin, um vit náa tað hesumegin ella eftir summarfrítíðina.

So ítróttaráhugaðir føroyingar hava avgjørt nakað at gleða seg til komandi tíðina, við tað at SVF hevur hesar ætlanir viðvíkjandi sendingum av ítrótti. So er bert at vóna, at alt gongur eftir ætlan hjá teimum, og vit ynskja teimum góða eydnu við arbeiðnum.

**ÚTsjón**

**Einki ummæli er hesa vikuna – tað verður við aftur næstu viku**

## Fjølmiðlar á ferð

*Fyri stuttum vóru umboð fyri fleiri av føroysku fjølmiðlunum á Cruise-ferð, og um páskirnar senda bæði Útvarpið og sjónvarpið sendingar hesum viðvíkjandi*

Jákup Mørk

Á ferðinin vóru fjølmiðlafólkini og vitjaðu á ymsum støðum á miðjarahavsleiðini. Bíbilsku støðini í Egyptalandi og Ísrael vórðu vitjað, og flestu staðni fingu tey høvi at hitta føroyingar, sum búðu á staðnum.

Nakað hevur verið at lisið í skrivaðu fjølmiðlunum um ferðina, har tey, umframt at vitja í Egyptalandi og Ísrael, eisini vitjaðu í Grikkalandi og Italia, har føroyingavitjanir sjálvsagt eisini vóru á skránni.





**Zacharis í Ísrael**

Í havnarbýnum Haifa hitti Zacharis Hammer hjúnini Hannu og Amy Katman. Hanna er dóttir Eliesar og Lydiu Arge í Havn. Hon hevur búð í 25 ár í Ísrael, gift við ísraelsmanni og tey eiga trý børn. Seinastu 6 árini hava tey búð í nýggjari jødiskari niðursetu bygd stutt sunnan fyri libanska markið. Her hevur verið og kann vera ófriðaligt. Serliga eru nógvar bumbuspreingingar at hoyra við libanska markið.

Hanna vísur okkum hvussu tey búgva, bumbuskýlið og tey mongu frukttrøðini í havanum. Hon sigur frá, hvussu tað er at búgva og liva í dagsins Ísrael, um spentu støðuna , stóru mótsetningarnar í landinum og land fyri frið. Vit uppliva Ísrael tveytúsund ár seinni enn fyrstu kristnu páskini.

Eftir bert 29 tímar í Ísrael gongur leiðin til Grikkaland, gjøgnum Korint veitina og til Rom. Hetta er leiðin kristni boðskapurin kom til Evropa. Fleiri apostlar og mong kristin gjørdist pínslaváttar í Rom. Í dag býr leiðarin fyri størstu kristnu kirkjuni í Rom, og her finna vit flestu listaverk og standmyndir úr jødisku og kristnu søguni.

SVF sendir frá ferðini langafríggjadag og páskadag.

**Fremmandir føroyingar**

Útvarpið var eisini við á ferðini, og í hesum sambandi hevur Jógvan Jespersen gjørt sendingar við heitinum, Á ferð í heilaga landinum.





Í øðrum parti av hesum sendingum, sum verður send langafríggjadag, vitjar útvarpsstjórin bíbilsku støðini í Jerusalem, Betlehem og Nazareth.

Úr Grikkalandi verður prátað við Aimé Thomsen av Strondum, sum hevur búð í grikska høvuðsstaðnum í 7 ár, og greiður hon frá, hvussu tilvera hennara er skipað.

Síðani verður farið víðari til Rom, har Jeanette Pøhlsgaard nú hevur búleikast í 10 ár.

**Nógv páskatilfar**

Umframt omafyrinevndu ferðafrásøgnir, fara bæði út- og sjónvarp at senda hópin av páskatilfari, umframt at fleiri útlendskir spælifilmar verða at síggja.

Alt í alt er sostatt líkt til, at loftmiðlarnir hava í hyggju at gera sítt til, at talan kann gerast um eini hugnalig páskir, har øll fáa eitt sindur av tí, sum teimum dámar at lurta eftir ella hyggja at.